# Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið**

Dagfesting: 03.12.2018
Mál nr.: 17/00982
Málsviðgjørt: JN/MM/FP

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## virkið musikkskúlastjórans

Við heimild í § 5, stk. 6 í løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan, verður ásett:

**§ 1.** Musikkskúlastjórin skal undir ábyrgd landsstýrismansins leiða, standa fyri og samskipa musikkskúlaskipanina.

**§ 2.** Musikkskúlastjórin skal taka sær av yvirskipaðu fakligu, námsfrøðiligu, fíggjarligu og samskipandi uppgávunum í musikkskúlaskipanini.
*Stk. 2.* Musikkskúlastjórin hevur ábyrgd av, at undirvísingin verður framd sambært lóggávuni.
*Stk. 3.* Musikkskúlastjórin skipar fyri lærarabýti, tímabýti og lærugreinabýti skúlanna millum fyri hvørt skúlaár.
*Stk. 4.* Musikkskúlastjórin skal syrgja fyri, at musikkskúlarnir halda tær skyldur, ið ásettar eru í løgtingslógini.

**§ 3.** Musikkskúlastjórin hevur skyldu at halda seg kunnugan við ta gongd og menning, ið fer fram innan tónleik og tónleikaundirvísing.

**§ 4.** Musikkskúlastjórin hevur skyldu til í ávísum vavi at vitja musikkskúlarnar og halda seg kunnugan við virksemi teirra.
*Stk. 2.* Musikkskúlastjórin skal vera teimum einstøku musikkskúlunum til hjálpar við vegleiðing og ráðgeving í fakligum og námsfrøðiligum spurningum.

**§ 5.** Musikkskúlastjórin hevur arbeiðsstað í Undirvísingarstýrinum.

**§ 6.** Musikkskúlastjórin hevur eftirlit við royndum, sum kommunali musikkskúlaleiðarin skipar fyri.
*Stk. 2.* Musikkskúlastjórin skal góðkenna skipanina við royndum á orgulútbúgvingini og musikkskúlamiðnámsútbúgvingini.

**§ 7.** Musikkskúlastjórin setir í starv og loysir úr starvi musikkskúlalærarar í samráð við kommunala musikkskúlaleiðaran og musikkskúlalærarar. Í aðrar mátar er setanarpolitikkurin hjá tí almenna galdandi.

**§ 8.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, xx. desember 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen